VB-Stjørnan 30-25 (13-11)

# VB hongur í toppinum

**Seinasti møguleikin hjá VB at halda fast í oddaliðnum var sunnudagin, tá Stjørnan vitjaði, og hesaferð lótu tær í Vági ikki møguleikan fara framvið**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tá tosað hevur verið um kvinnuhondbóltin í vetur, hava tað einamest verið VÍF og Stjørnan, sum hava verið havd á lofti. Higartil hava tey skúgvað øll onnur lið til viks í FM-stríðnum, men eisini bara higartil.

VB hevur alla tíðina verið mett sum trið sterkasta liðið í kappingini, men eftir tvey tap fyri VÍF, eins og tap á útivølli fyri Stjørnuni, var meira ella minni líkt til, at tær eisini máttu taka til takkar við at verða triðbest.

Sjálvar hava tær í Vági tó ongantíð mist trúnna, og tá Stjørnan vitjaði sunnudagin, sýndu tær eisini í verki, at tað væl kann vera, at tær hóast alt fara at seta kílar í, nú endaspælið er um at fara ígongd.

## Simona spældi við

Stjørnan var annars á pappírinum styrkt, við tað at Simona Dziugyte í evstu løtu fekk spæliloyvið útflýggja til dystin. Spurningurin er tó, um hetta yvirhøvur styrkti um hjá Stjørnuni, ella um alt stríðið við at fáa spælilovyi ikki heldur órógvaði meira enn gott var undan dystinum.

Um tað var hetta, ella um onnur viðurskifti gjørdu seg galdandi, verður verandi óvist, men sum skilst á øllum brøgdum, so var VB tað ágrýtnari liðið frá byrjan av dystinum.

Við sterkum verjuspælið órógvaðu tær alla tíðina stjørnuálopini, og sluppu klaksvíkingarnir framvið, tók Guðrun í Lágabø sær av fleiri stjørnuskotum. Í álopspartinum dúvaði VB hesa løtuna nógv upp á tær báðar útlendsku, og spakuliga fór VB at toga frá Stjørnuni. Nógv mál var tó ongantíð talan um hesa fyrstu løtuna, men hinvegin førdi leiðslan við sær, at VB-genturnar bara styrktust í trúnni um, at tað væl kundi lata seg gera at basa meistarunum.


*Stjørnan mátti taka til takkar við ósigri suðuri í Vági, og nú er VB so smátt fara blandað seg upp í oddin*

## Mansvardu tríggjar

Við styrktum sjálvsálitið komu VB-kvinnurnar soleiðis út til seinna hálvleik, og tað var eisini skjótt, at tær fóru at draga frá Stjørnuni.

Hálvleiksmunurin á tvey mál varð øktur upp í sjey, tá hálvrunnið var, og tað var eisini greitt, at okkurt heilt serligt skuldi til, um Stjørnan skuldi vinna hetta innaftur. Fyrsta royndin hjá gestunum var at mansverja Andreu Lütz, og tá hetta ikki tóktist at hjálpa stórvegis, varð eisini farið út eftir Reginu Radó og Gurið Mortensen seinastu løtuna.

Úr Vági skilst, at hetta viðførdi eitt sera fjálturs-stungið VB-avrik seinastu løtuna, og tað eydnaðist eisini Stjørnuni at skora fýra mál á rað. At tað ikki gjørdist til fleiri mál var í stóran mun Guðrun í Lágabø at takka, og tá VB so aftur fekk nøkur kontra mál burtur úr bjarginum hennara, var alt í roynd og veru avgjørt.

## Hetta var ikki nøkur avgerð

Eftir dystin spurdu vit venjaran hjá Stjørnuni, Rógva Nielsen, um tapið hevði við sær, at Stjørnan misti eitt avgerandi fet í FM-stríðnum, men hann var tó ikki av teirr áskoðan.

– Skulu vit vinna FM, skulu vit framvegis vinna báðar dystirnar móti VÍF, so í so máta broytir hetta einki hjá okkum. Væl kundu vit á pappírinum klára okkum við einum javnleiki og einum sigri, um vit vunnu hendan dystin, men vit fara so á vøllin fyri at spæla upp á javnleik í hondbólti, sigur venjarin.

Hann leggur afturat, at umframt dystirnar millum VÍF og Stjørnuna, so ivast hann ikki í, at dystirnir í Vági verða avgerandi fyri gullmerkini hetta kappingarárið.

– VB var liðið, sum vildi vinna í dag, og spæla tær soleiðis framyvir, er einki at ivast í, at bæði vit og VÍF fáa tað sera trupult móti teimum. Í so máta kann tað kanska vera ein fyrimunur, at vit taptu hendan dystin, tí nú er einki at ivast í, at motivatiónin hjá VB er í topp, sigur Rógvi Nielsen at enda.

## Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Regina Radó 10(3), Christina Holm 7, Andrea Lütz 6, Gurið Mortensen 2, Mary Krosslá 2, Sólrun Krosslá 1
Stjørnan: Vesna Tomjek 6(3), Sólva Eystberg 4(2), Annika Ljósstein 3, Bára Skaale 3, Joan M. Joensen 3, Una Olsen 3, Anna Kristina Samson 2, Simona Dziugyte 1
Brotskøst: VB 3, Stjørnan 6
Útvísingar: VB 4, Stjørnan 1
Dómarar úr H71: Petur S. Dahl og Ragnar Simonsen

# Virðingin burtur

**En hin største orsøkin til góða føroyska málverja-avrikið var sambært málverjanum sjálvum, at hann hesaferð hugsaði meira um egnar dygdir enn tær hjá mótstøðumonnunum**

LANDSDYSTIR
*Jakup Mørk*

Ein av stóru føroysku trupulleikunum í dystunum móti Rumenia var, at tað hjá málverjum okkara tók heldur langa tíð, áðrenn teir veruliga komu inn í dystin. Tá tosaðu vit eftir dystirnar við Jóhan Danielsen, og hann helt eina orsøk til hetta vera, at virðingin fyri mótstøðuni var alt ov stór.

Fríggja- og leygardagin var hetta tó eingin trupulleiki longur. Jens Skipagøta, sum byrjaði í málinum fríggjadagin, legði fyri við fleiri góðum bjargingum, og virðing fyri mótstøðuni tóktist í øllum førum at vera nakað, sum hann so slettis ikki hevði hugsað um.

Spurdur, um hetta var nakað, sum málverjarnir høvdu arbeitt serstakt við í vikuni, svarar málverjin, at tað var tað sum so ikki, men hinvegin var hetta kanska nakað, sum teir hugsaðu um, hvør í sínum lag.

– Undan hesum dystunum royndi eg bara at hugsa um, hvussu mítt spæl skuldi vera, um so var, at eg slapp á vøllin. Hjá einum málverja ræður jú fyrst og fremst um at plasera seg rætt í mun til verjuna, og ikki hugsa alt ov nógv mótstøðuna. Tí royndi eg bara at gloyma alt um hinar, og yvirhøvur at verða so arrogantur sum møguligt tá dysturin fór ígongd.

– Tað skal tó leggjast afturat, at eg ikki haldi, at skotini hjá sveisarunum vóru eins góð, sum tey hjá rumenum. Tey vóru kanska líka hørð, men neyvleikin var ikki hin sami, og yvirhøvur haldi, at spælið hjá Sveis hóskaði okkum betri enn tað hjá Rumenia.

## Tryggari men ikki tryggur

Spurdur, um hann nú eftir hesar dystirnar kendi seg tryggari í landsliðshópinum, segði Jens, at tað gjørdi hann sjálvandi.

– At tú sleppur at standa tveir slíkar dystir á tamb gevur sjálvandi sjálvsálit, og vónin um at vera við næstu ferð er sjálvandi størri nú, enn hon var fyri einari viku síðani.

– Tað hevur tó eisini alstóran týdning fyri avrikið, at tú sum málverji sleppur at byrja ein dyst í málinum. Sum oftast er tað sera trupult at verða tveittur inn miðskeiðis í dystinum. Tá er man kaldur oh ikki nóg hugsavnaður og tí kann tað skjótt gerast ógvuliga frustrerandi í málinum. Hetta var kanska ein avgerandi fortreyt fyri, at tað gekst mær somikið væl, men eg eri heldur ikki í iva um, at Jóhan hevði gjørt tað eins væl, um tað var hann, sum byrjaði dystirnar, so tryggur í málinum eri eg als ikki, sigur Jens Skipagøta at enda.


*Jens Skipagøta stóð tveir branddystir um vikuskiftið, men hetta rakk so ikki til stig hjá føroyska liðnum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Uttan dyst

Hóast VB og Tjaldur ikki hava avgreitt sínamillum dystin í Vági, so verður grundspælið nú roknað sum liðugt spælt.

HSF hevur gjørt av, at VB skal vinna dystin uttan dyst (við málmuninum 0-0), tí Tjaldur ikki møtti upp til dystin.

Úr HSF verður sagt, at avboðið frá Tjaldri kom ov seint, og tískil er í stigatalvunum her í blaðnum roknað við, at øll liðini í bestu deildini hava leikt 12 dystir.

**jm**



# Klaksvík á odda

**Nú kappingin er komin í helvt liggja klaksvíkingar einsamallir á odda. Teir vunnu sannførandi á vestmenningum, meðan havnarmenn vunnu sín fyrsta dyst í ár ímóti kollfirðingum.**


*Flóvin Tór Næs var komin heim til hetta umfarið, men noyddist at taka til takkar við javnleiki á fyrsta borði*

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Í Klaksvík vóru vestmenningar á vitjan sunnudagin og úrslitið gjørdist ein tryggur 3-1 sigur til heimaliðið.

Rani Nolseø og John Rødgaard hava mangan sitið nógvar góðar og drúgvar tímar og stríðst ímóti hvørjum øðrum, men hesaferð vardi talvið bert fjúrtan leikir. Rani sum hevði svarta fólkið, leikti væl og útjavnði stutt inni í talvinum, og tá John býtti frúnnar og bjóðaði javnleik tók Rani av hesum tilboði.

Steintór hevur higartil havt góð úrslit á klaksvíksliðnum, men uppgávan ímóti formsterka Torbjørn Thomsen er ikki ein av teimum løttu. Skjótt varð farið úr ástøðuni, og eftir at báðir høvdu roynt ymsar snildir uttan úrslit, samdust teir um javnleik. Torbjørn hevði annars vunnið øll síni talv undan hesum umfari.

Tummas M. Anthoniussen hevur verið álitið hjá klaksvíkingum í ár, og hesaferð lat hann sínar kynstir ganga útyvir John Jacobsen. John trýsti Tummas í byrjanini, men var ov bráður við róki sínum, og hetta revsaði Tummas og niðurspældi hareftir John.

Á fjórða borði vann Ingolf Gaard á Petur Højgaard. Petur stóð betur, men Ingolf vardi seg væl og bíðaði til røttu løtuna at leypa hvøkk á, og eftir hetta telvaði hann sannførandi og mátaði at enda Petur.

3-1 og leiin sær út til at vera sett hjá teimum har norðuri, meðan spurningurin er um vestmenningar kunnu fóta sær. Teir hava havt tvey ivasom úrslit á rað, og nærkast nú av álvara botninum.

## Flóvin við hjá Havnini

Leiðslan í Havnar Telvingarfelag hevur ivaleyst ikki sæð aðrar møguleikar enn at styrkja um liðið, sum lá niðast undan dystinum ímóti kollfirðingum. Boð vórðu send eftir útisetanum og føroyameistarnum Flóvin Tór Næs, sum óvæntað ikki fekk stórmeistara ímóti sær. Yvir av honum sat ístaðin tann ungi Hans Kristian Simonsen.

Eitt sindur óheppið fyri kappingina at kollfirðingar bert nýta sínar stórmeistarar av og á. Tað ger nevnliga kappingina eitt sindur misvísandi at teir t.d ímóti Sandavági hava GM Henrik Danielsen og ímóti Havnini ongan GM´ara. Trupulleikin er, at ein aldrin veit hvør situr á fyrsta borði og tí verður eingin møguleiki hjá einstøkum at fyrireika seg.

Stórmeistari ella ei, Hans Kristian tók uppgávu sína av álvara og fekk eina betri støðu við svarta fólkinum í miðspælinum. Flóvin bjóðaði Hans Kristian javnleik, sum hesin tók av. Tað vísti seg at Hans Kristian átti at leikt víðari, har hann hevði kunnað ognað sær finnu og við røttum spæli fingið avgerandi fyrimun, ella í minsta lagi kláran fyrimun. Helst var tað virðing sum lat seg ávirka. Eitt gott úrslit hjá Hans Kristiani.

Herluf Hansen hevði einki stig fingið undan talvinum ímóti Bernhard Thomsen, men sunnudagin fall eydnan í hansara lut. Herluf fekk ræðið yvir c-linjuna og skjótt fekk hann avgerandi fyrimun og vann talvið.

Á triðja borði offraði Pól Martin Hansen kvalitet og fekk heilt gott spæl, men Olaf Berg vardi seg væl og fekk ognað sær javnleikin.

Andrias Ziska hevur verið nógv við í ár, og sunnudagin vann eisini sítt talv ímóti Grettir Djurhuus í eyðkendum stíli. Hann offraði frúgv fyri rók, bisp og riddara og trýsti spakuliga Grettir niður, til hann at enda gavst.

Ein ómetaliga kærkomin 3-1 sigur hjá havnarmonnum, tann fyrsti í hesari liðkapping. Kollfirðingar duttu hinvegin niður á eitt triðja pláss.

## Hvalvíkingar fylgja væl við

Sandavágsmenn fingu ótrúligt úrslit í seinastu viku í Vestmanna við 2-2 úrslitinum, og fóru tí við fitt av sjálvsáliti til dystin ímóti hvalvíkingum. Men teir úr sundalagnum løgdu ikki petti í og vunnu heili 3-1 og hava lagt seg á eitt annað pláss.

Martin Brekká vann enn einferð, hesaferð ímóti Bernhard Augustinussen. Gutti Petersen sum fekk javnleik ímóti John Rødgaard í farnu viku, megnaði eisini hesuferð at yvirraska. Finnbjørn Zachariassen kláraði ikki at koppa Gutta, og javnleikur bleiv úrslit teirra.

Á triðja borði vann Sámal Christiansen á Hera Christoffersen, meðan Sonni Nielsen og Bergur Magnussen leiktu javnt.

Tapið viðførdi at teir úr Sandavági nú eru aftastir í røðini, men fá stig eru tó upp til teir næstu.

Støðan:

| | |
|---|---|
| Klaksvík | 12,5 |
| Hvalvík | 11,5 |
| Kollafjørð | 10,5 |
| Havnin | 9,5 |
| Vestmanna | 8,5 |
| Sandavágur | 7,5 |

Havnarmenn hálaðu seg vekk frá botninum, og eru í roynd og veru ikki langt frá toppinum. Klaksvíkingar eru komnir í ein góðan stima, har øll fara borðini fáa nógv stig til hølvdar, og tað sama kann nærum sigast um hvalvíkingar.

Sætta umfar sum verður leikt komandi leygardag, verða hesir dystir: Kollafjørður – Klaksvík, Vestmanna – Hvalvík og Sandavági – Havnin.

## Minni gott

Fjórða umfar í donsku liðkappingini var telvað um vikuskifti, og føroyska liðið í Keypmannahavn sum framanundan lá einsamalt á odda í triðju deild, má nú deila fyrsta pláss við Ballerup.

Føroyingarnir møttu botnlinum Saxo, men sera óvæntað endaði dysturin javnur 4-4. Úr Saxo komu bert sjey mans, sum viðførdi at Eyðun Nolsøe vann uttan dyst á triðja borði. Saman við Eyðuni vunnu Bogi Ziska, Terji Petersen og Carl Eli Nolsøe Samuelsen, meðan John Arni Nilssen, Heini Olsen, Heini Danielsen og Finnbjørn Vang máttu lúta. Talvið hesa vikuna er talvið hjá Terja.

Flóvin Tór Næs var í Føroyum um vikuskifti og telvaði tískil ikki við.

Eitt minni gott úrslit hjá Talvfelagnum Føroyar, nú trý umfør resta í.

John Arni hevur júst luttikið í einari kapping í Noreg, har hann fekk fimm stig av níggju. Hetta var eitt sindur undir væntaðu skoruna og misti hann tískil nøkur fá ratingstig.

## Talvið hesa vikuna

Terji Petersen (2081) – Bjarne Henriksen (1670)
3.deild, Danmark
Viðmerkingar: Terji Petersen og Carl Eli Nolsøe Samuelsen

1.d4 Nf6 2.c4 g6 3.Nc3 d5 Danin telvar Grunfeld byrjanina, sum eitt nú Kasparov oftani leikar 4.cxd5 Nxd5 5.e4 Nxc3 6.bxc3 Bg7 7.Bc4 c5 8.Be3 Nc6 9.Ne2 0-0 10.0-0 cxd4 11.cxd4 Bg4 12.f3 Na5 13.Bd5 [13.Bxf7+ Rxf7 14.fxg4 Rxf1+ 15.Kxf1 er nógv telva_, og gevur eisini svørtum gott spæl fyri finnuna.] 13...Bd7 14.Rb1 Qc8?! [14...a6 15.Bxb7 Ra7 16.Bd5 Bb5 og svartur fær finnuna aftur vid røttum spæli.] 15.Qd2 Nc6 16.Rfc1 e5 17.dxe5 Bxe5 18.g3 Qc7 19.Bc5 Rfe8 20.f4 Bg7



21.Bd6 Qc8 [21...Qxd6?? 22.Bxf7+ og svartur missur frunna.] 22.a3 Bf8 23.Be5!? Nxe5 [23...Bxa3? 24.Ba1! og hvitur vinnur vegna a1-h8 diagonalin.] 24.fxe5 [24.Rxc8?? Nf3+ 25.Kg2 Nxd2 og svartur vinnur] 24...Bc6? [24...Bc5+ 25.Kh1 Rb8 gevur svørtum moguleika at berjast vidari.] 25.Nd4 Qd8 26.Nxc6 bxc6 27.Rxc6 Bxa3 28.Rf6 Bc5+ 29.Kh1 Rxe5 30.Rbf1 Rxe4 31.Rxf7 Kh8 32.Qh6 Qg8 33.Bxe4 og svartur gavst. 1-0

## Einkultúrslitini á liðnum eftir fýra umfør:

John Arni Nielsen 2 av 4
Heini Olsen 2 / 4
Flóvin T. Næs 2 / 2
Eyðun Nolsøe 2,5/4
Bogi Ziska 3 / 4
Heini Danielsen 2,5/4
Terji Petersen 1,5/3
Carl Eli N. Samuelsen 4 / 4
Finnbjørn Vang 2 / 3

## Wijk aan Zee

Í næstu grein, sum verður í leygardagsblaðnum verður hugt nærri at krútsterku kappingini, Corus-Wijk aan Zee, sum í løtuni verður telvað í Hollandi. Allir teir sterku luttaka, og eftir tveimum umførum liggur Kasparov á odda við fullum stigatali, meðan heimsmeistarnir Kramnik og Anand liggja beint í hølunum. Meira um kappingina leygardagin.